# ugnin ræður í stovu



*Leikur eru bæði til dreingir og gentur. Hesum báðum dáma best í "byggivinnuni"*

## Nýggjur stovnur undir Hálsi

**Klaksvík:** Í mars mánaði samtykti Sosiala nevndin hjá býráðnum at fara undir fyrireiking av byggingini av einum stovni undir Hálsi.

Síðani tá hevur umsitingin í býráðnum arbeitt víðari við málinum. Nevndin samtykti at byggja stovnin í stigum, men umsitingin mælir til at fremja alla ætlanina í einum byggistigi.

Umsitingin grundar hetta á, at stovnurin allarhelst ikki kann verða klárur at taka í nýtslu í ár, og at hetta tí fer at gera stovnin dýrari. Mælt verður eisini til at bjóða byggingina út sum eina totalenterprisu.

Síðani hava sosiala nevndin og fíggjarnevndin havt málið til viðgerðar, og biður nú teknisku umsitingina í býráðnum um at gera tilmæli um útbjóðingarmøguleikar.

**sb.**

Og tá klokkan er vorðin 15:45 fer ein bussur við fegnum, men kortini troyttum børnum tvørtur um byrgingina og aftur til Klaksvíkar.

### Krabbar og útisvimjing

Talan er jú um ein útibarnagarð, og í tí navninum liggur sjálvandi, at børnini skulu vera uttandura fyri tað mesta.

Í Haraldssundi eru frálíkir møguleikar til tess, og tað sermerkir eisini, sum vera man, "arbeiðsdagin" hjá børnunum.

Bygdin liggur niðri við sjóvarmálan, tætt við eina byrging og har rennur eisini ein á gjøgnum bygdina. Stórur hagi er omanfyri bygdina, og har eru tey ofta. Og so finst haraftrat eitt buchwald nær við, har góðir møguleikar eru til spæl hjá børnum.

Áin er eisini eitt væl umtókt spælipláss hjá børnunum. Og ein góðan og heitan summardag kemur meiri enn so fyri, at børnini fara at svimja í ánni – í klæðum, væl at merkja.





*Hóast útibarnagarðurin er inni ber væl til at fáa sveittan fram, tá pútukríggj er á skránni*

Eitt, sum børnunum dámar sera væl er at fara oman í fjøruna. Har finst eitt stórt tal av krabbum, og tað nakað sum børnini gleða seg til, tá tey fara oman hagar, so er tað júst at fanga hesar krabbarnar.

Í so máta hevur Haraldsstova allar møguleikar til at geva børnunum ein áhugaverdan dag í Haraldssundi, bæði úti og inni.

### Prinsessa og cowboy

Ein hósdag í farna mánaði, tá vit vitjaðu í Haraldssundi, vóru børnini kortini inni og spældu.

Henda dagin, sjálvan summarmáladag, var klárt, men rættiliga kalt í veðrinum við væl av vindi. Men tað var kortini ikki hetta, sum helt børnunum inni henda dagin.

Uppi á loftinum vóru børnini nevniliga í ferð við at fyrireika seg til eitt sjónleikartiltak, sum skuldi vera dagin eftir á Bókasavninum í Klaksvík. Og tey skuldu sjálvi standa fyri tiltakinum, sum gongur uppá skift millum barnagarðarnar í Klaksvík.

Dagarnar frammanundan høvdu tey gjørt leikbúnar og hattar – eisini cowboyhattar - til endamálið, og tyktust vera sera spent eftir at sleppa at framføra hetta fyri hinum børnunum í barnagørðunum.

Leikurin er gjørdur út frá eini søgu, sum børnini sjálvi hava funnið uppá. Tey høvdu avgjørt, hvør skuldi siga hvat, og soleiðis var leikurin vorðin veruleiki.

Í leikinum vóru bæði firvaldar, cowboyar, ein lítil hundur og ein prinsessa, - bara fyri at nevna nakrar av leikarunum.

Og sum myndin frá bókasavninum vísir, so var leikurin eisini sera spennandi og vælleiktur - og ikki minst væl umtóktur av hinum børnunum.

### Nýggjur

Útibarnagarðurin í Haraldssundi lat upp í januar mánaði í fjør.

Men talan er jú um eitt bygdarhús, við einum stórum sali niðriundir og fleiri rúmum í ovaru hæddini.

Húsið er tí ikki – sum so - innrættað til eitt slíkt endamál sum ein útibarnagarð, men kortini tykjast børnini at hugna sær.

Í Klaksvík er ein annar útibarnagarður, og heldur hann til úti í Grøv, tey nevna.